Sosialurin Nr. 81 - 30. apríl 2003 <ph_1> 5

# Ljósir litir til summarið



Móti er nógv, men klæðir mugu sigast at vera eitt tað fyrsta einum kemur til hugs, tá hugtakið móti verður nevnt. <ph_1> hevur vitjað klædnahandilin Total í Klaksvík og spurt tey, hvat er "in" millum ungar gentur í dag.

Tað letur til, at tað eru teir ljósu litirnir, sum gera nógv um seg fyri tíðina. Summarið stendur fyri durum, og um veðrið heldur fram at skikka sær so væl sum tað gjørdi á páskum, so verða summar litirnir nógv nýttir í ár.

Frá Total siga tey, at tað serliga er merkið Vero Moda, sum stýrir mótanum. Vero Moda er eitt væl umtókt merki millum gentur í aldrinum 18 ár og uppeftir. Eisini er Sisters vælumtókt, men tað eru yngri gentur sum keypa tað. Tær flestu millum 14 og 16 ár. Tað kemur kanska serliga av, at støddirnar eru so lítlar í tí.

Eitt sum ger, at júst hesi bæði merkini eru so væl umtókt er, at tey ikki eru so dýr. Av merkjunum fáast blusur fyri millum 90 og 120 krónur, so tað eru nógvar gentur, sum keypa tær - og við stuttum millumbilum skifta tær so eisini út.

Kovboybuksurnar frá Vero Moda ganga eisini sum heitt breyð. Serliga tær vaskaðu og slitnu. Tað serliga við teimum er, at tað ikki er eitt par, sum er líka, tí at tær verða vaskaðar hvørt parið fyri seg. Hetta ger, at tær slítast á ymiskan hátt.

Eisini eru tær stuttu buksurnar modernaðar nú. Í Total vænta tey, at fram móti Norðoyastevnuni og inn í summarið verða tað tær stuttu buksurnar, sum fara at selja mest, soleiðis sum gongdin er nú. Hesar buksurnar eru ikki heilt stuttar, men tað sum kann kallast trýkvart. Tað vil siga, at tær koma niður til skinnabeinini.

Tá tað so fer at líða longur út á summarið, og heystið fer at nærkast, verða litirnir meira døkkir aftur. Svart og ymiskir gráir litir fara tá at verða nógv at síggja. Tær stuttu buksurnar fara at halda fram, meðan kragatroyggjur væntandi verða meira at síggja tá.

Hvat síðani verður, tá tað líður longur til jóla er ilt at siga nakað um nú, so tað má bíða til tað er liðið longur út á heystið. Men ongin ivi man vera um, at í summar fara stuttar buksur og ymsar blusur í ljósum litum at verða nógv at síggja.







# H r vi l ggjum vindi

Várið er komið, og summarið nærkast við stórum fetum. Og júst sum vár skiftir til summar, so skiftir mótin eisini. Ikki bert innan klæðir, men eisini innan hár. Vit hava verið í Salong Bronx, har Lissi Mouritsen fyri góðum hálvum øðrum ári síðani lat upp egna hárfríðkanarstovu.

– Nú fyri tíðina er hárið bæði langt og stutt, og nógvir ljósir og myrkir litir verða nýttir. Reyðum er ikki so nógv av beint nú, sigur Lissi.

Afturvendandi nú fyri tíðina er, at hárið skal ikki síggja ov pent út, men helst vera eitt sindur rokaligt, og tað er galdandi bæði fyri mannfólk og konufólk.

– Mannfólk vilja eisini gjarna hava eitt sindur av hári. Altso hárið er ikki so stuttklipt, tí soleiðis fáa teir eitt sindur at manerera við, greiðir Lissi frá.

Langt hár er »in«, men tað skal ikki verða klipt beint av. Fruntur og aðrar lítlar detaljur gera nógv við langt hár, og fáa tað at síggja festligari út.

– Stutt hár er eisini nýmótans, men eg vil siga, at fleiri fara eftir langum hári enn stuttum. Um tú hevur stutt hár, so ber til at brúka nógvar litir, og gera tað nokkso »pjuskut«, sigur Lissi, sum viðgongur, at tað eru tey ungu, sum tora best at nýggja tann nýggja hármótan.

Eins og klædnamótin, so skiftir hármótin við árstíðunum. Lissi sigur, at tá tað fer at líða ímóti sumri, so vilja fólk hava ljósari hár.

– Um veturin ganga fólk ikki so nógv til frisør, men tað merkist væl, tá okkurt er í hondum. Sum til dømis jól, páskir, ólavsøka og so framvegis. Tað merkist eisini aftur, tá konfirmatiónirnar koma í hæddina um várið og heystið, sigur Lissi at enda.

# Hygg m tt kl dnask p!










Jógvan Páll Lassen er sakførari.

Umframt er hann eisini pápi, og tað er ikki einum og hvørjum hann er pápi hjá. Teitur Lassen er nevniliga sonur Jógvan Páll, sum vit her hava sett stevnu. Hann hevur latið skápshurðarnar upp á víðan vegg, og víst okkum eitt sindur av tí, hann hevur at velja ímillum um morgnarnar áðrenn hann fer til arbeiðis.

Í skápinum hanga mest klædningar. Í øllum møguligum litum. Svartir, gráir og fleirlittir klædningar eru at síggja, og eisini eru skjúrturnar nógvar í tali, og hongur alt pent og nýstrokið uppi.
– Tað eru mest klædningar og skjúrtur í skápinum hjá mær, tí tað er jú tað, sum eg brúki til dagligt í mínum arbeiði. Men so havi eg sjálvandi ymiskt annað til mína frítíð, sigur Jógvan Páll, meðan hann vísir okkum, hvat goymir seg handan hurðarnar á skápinum.

Ymiskt er, hvat fyri klædningur verður nýttur til hvørt høvið. Og tá Jógvan Páll veruliga skal vera fínur, so fer hann í tann svarta Versace klædningin, sum er goymdur í einum klædnaposa.

– Nakrir klædningar eru bara til slips, men aðrir eru soleiðis, at ein kann vera í eini léttari blusu innanfyri. Eg haldi, at eg eigi einar 10 klædningar.

– Eg havi altíð keypt ordilig klæðir, sum góðska er í. Tey halda betri, og tey rukkast ikki so illa. Tú kanst léttliga fara í flúgvaran og sita har í tveir tímar, og fara beinleiðis til ein fund í Keypmannahavn tá tú kemur, greiðir Jógvan Páll frá.
Tá sakførarin fer sær ein túr, so er hann í gonguskóm og góðum Helly Hansen regnklæðum um veðrið ikki er til vildar. Og hann krógvar ikki, at hann er HB´ari, tí tá hann er úti og rennur, so er tað í HB drakt.

– Á floti eri eg í einum gomlum oljuklæðum, sum pápi átti. Tey eru eini 30 ára gomul, men tey halda væl, og haldi eg, at tað er ógvuliga stuttligt. Hansara navn stendur eisini enn í klæðunum.

Jógvan Páll dylir ikki fyri, at honum dámar væl at keypa ítróttarblusur. Í løtuni er tað ein blusa hjá italska landsliðnum, sum honum dámar ógvuliga væl, tí hon er so góð at skía í.
– Eg havi ein Kjus skíjakka, sum er ógvuliga góður, sigur Jógvan Páll, meðan hann vísir okkum jakkan, sum er reyður og svartur.

– Eg gangi ikki so øgiliga høgt uppí móta. Klæðini eg keypi eru klassisk og góðskugóð. Um tú fert væl við einum klædningi kann hann halda eini 10 ár.

Sakførarin sigur, at hann vil heldur gjalda eini tveir hundraðkrónuseðlar meira fyri góðsku enn at keypa okkurt bíligt, sum ikki er eins gott.
Beint áðrenn vit fara avstað vísir Jógvan Páll okkum ein hatt, sum hann hevur fingið frá soninum Teiti. Hetta er tó ikk ein hattur, sum hann fer út í.